SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Kikarakanning av hálsi

Tú skalt kikast niður í hálsin. Hetta er ein kanning, har hugt verður niður í hálsin og svølgið við einum slag av kikara. Samstundis kunnu møguligar polyppir, knútar ella avlopsslímhinnur á raddarbondunum (stemmubondunum) verða tiknar.

Skurðviðgerðin (kanningin) tekur áleið ein ½ tíma, í fullari doyving.

**Eftir skurðviðgerðina:**

Kann tað koma hosti, men normalt ongin pína. Vanliga sleppir tú heim sama dag, og við tær fært tú eina tíð til kontrol og møguligt royndarsvar í viðtalu okkara.

**Eftirsjúka.**

Stuttvarandi hæsi kann koma fyri aftaná skurðviðgerðina (kanningina). Sera sjáldan kunnu tannskaðar, fyribils broyting av smakki og ilt vil at svølgja koma fyri.

**Fyrivarni:**

Eftir skurðviðgerðina (kanningina) er neyðugt at hvíla røddina í nakrar dagar í samráð við oyrnalæknan. Síðani kanst tú so við og við brúka lina og luftmikla rødd.

Røddin skal koma av sær sjálvari og ikki noyðast fram.

Tú skalt ikki blíva móð/móður í røddini ella hásari, so má røddin hvíla seg.

Tú skalt ikki teska

Tú skalt ikki rópa

Tú skalt ikki harka, heldur hosta varisliga

Tú mást ikki roykja, tí tað seinkar lekingina

Sí www.sundhedsstyrelsen.dk, sóknast eftir royking og skurðviðgerðir

Vit frámæla, at tú tosar í telefon til røddin er góð

Tú kanst sjúkrameldast alt eftir skurðinntrivið, arbeiði og meting oyrnalæknans

Um tú fært andingarneyð – Ring 112

Tað kann gerast neyðugt við logopediskari vegleiðing.

Hevur tú aðrar spurningar í hesum sambandi, ert tú vælkomin at ringja á Oyrna-Nasa-Hálsdeildina á tlf.nr. 304622 millum kl. 10:00-12:00

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo